*Dánjal Nolsøe, løgfrøðiligur ráðgevi í marknatrætuni:*

# Spentur at hoyra boðskapin frá Hurd



Ein av teimum, sum hevur stóran vitan um havrættar-spurningar og helst telist millum teir mest serkønu á økinum í heila tíkið, er Dánjal Nolsøe, løgfrøðingur og fyrrv. landsdómari. Hann býr í dag í Danmark.

Hvørja ferð føroyska nevndin, sum samráðist við bretar um markið, verður kallað til fundar, er Dánjal Nolsøe við. Hann er løgfrøðilig ráðgeving hjá nevndini í havrættarspurningum.

Vit hava spurt hann, hvønn týdning tað kann fáa fyri samráðingarnar, at Edmund Joensen, løgmaður, í næstu viku skal hitta enska uttanríkisráðharran, Douglas Hurd.

Dánjal Nolsøe sigur seg vera sera spentan um, hvønn boðskap Douglas Hurd fer at koma við.

Annars er hann fegin um, at danski forsætismála-ráðharrin úttalar seg í málinum og ger bretar greiðar yvir principiellu støðu okkara.

Dánjal Nolsøe, sum ikki heldur tað vera rætt at úttala seg alment um markna-samráðingarnar, vil tó siga so mikið, at vit hava eina góða argumentatión at byggja á.

Hann heldur vit hava eina góða sak við góðum løg-frøðiligum kortum í hondini.

Næstu fundurin um marknaspurningin verður í London 21. februar.

**jan**



*Dánjal Nolsøe her saman við Martin Heinesen og Morten Sparre Andersen, jarðfrøðingum*

*Klinte útsetir fráferð:*

# Skal taka sær av drotningini eisini

Bent Klinte, ríkisumboðsmaður fer ikki úr starvi sínum 1. apríl sum ætlað. Hann hevur fingið áheitan úr forsætismálaráðnum um at bíða til danski forsætisráðharrin hevur vitjað í Føroyum. Tann vitjanin verður í døgunum frá 8. til 12. mai.

Síðani tað varð avgjørt, at Margretha drotning skal vitja í Føroyum í døgunum frá 22. til 26. juni hevur Klinte fingið enn eina umbøn frá arbeiðsgevara sínum um at steðga í tveir mánaðir afturat, soleiðis at hann gevst í starvi sínum umleið 1. juli.

Bent Klinte sigur við Tíðindablaðið Sosialin, at enn er eingin avgerð tikin um eftirmann hansara.

Helst verður nýggjur ríkisumboðsmaður settur at byrja í arbeiði sínum frá umleið august.

Umframt Nyrup og drotningina verður eisini ein onnur ráðharravitjan. Tað er Marianne Jeltved, búskaparmálaráðharri, sum er boðin til Føroya at vitja í døgunum frá 7. til 9. juni.

Enn ein ráðharravitjan verður í august. Tá kemur kirkjumálaráðharrin Birthe Weiss til Føroya.

**jan**






*Síðsta uppgávan hjá Klinte ríkisumboðsmanni í Føroyum verður at taka sær av drotningavitjanini. Her frá drotningavitjanini seinast. Mynd kalmar*

# Royndarveiða eftir stórhvali

*Skip í føroysku sjóøki siga frá nógvum stórhvali, sigur Kristiligi Fólkaflokkurin, sum mælir til, at vit fara undir royndarveiðu eftir stórhvali*

Kristiligi Fólkaflokkurin mælir løgtinginum nú til at áleggja landsstýrinum at kanna møguleikarnar at fara undir royndarveiðu eftir stórhvali í føroyskum sjógvi. Í sínum viðmerkingum til uppskotið sigur flokkurin millum annað, at frá 1894 og til seinra heimsbardaga hava vit rikið stórhvalaveiðu við Føroyar. Veiðan gav arbeiði til nógvar hendur bæði við Áir og í Lopra, og hetta stóra virksemi gav til tíðir stóra inntøku.

Eftir seinra heimsbardagan helt hvalaveiðan fram. Í áttatiárunum fór fram royndarveiða eftir stórhvali, men hesi seinastu árini hevur eingin royndarveiða verið.

Kristiligi Fólkaflokkurin sigur, at skip og bátar, sum fiska og annars sigla í føroyskum sjóøki, siga frá nógvum stórhvali. Harafturat føra vaktarskipini dagbók yvir hval tey sigga.

**Vilja men tora ikki**

Flokkurin sigur seg ikki ivast í, at allir føroyingar kundu ynskt, at vit skutu stórhval við Føroyar, men vit tora ikki, tí Greenpeace hóttir okkum. Hinvegin er Noreg ikki í iva um at geva loyvi til stórhvalaveiðu. Nógv lond hava gjørt vísindaligar avtalur at veiða stórhval.

**Mugu tryggja okkara rætt**

Kristiligi Fólkaflokkurin sigur, at tá stórhvalastovnurin rættuliga er komin fyri seg aftur, eiga vit at tryggja okkum tann rætt vit eiga. Hetta eiga vit at gera við at vísa á søgulig rættindi og vísindaligar royndir.

Flokkurin heldur, at fara vit vit undir royndarveiðu, eiga vit ikki gera sum íslendingar, at veiða ov nógv. Tiltakið bæði er, og sær truligt út, um vit bert skjóta nakrar fáar hvalir, og onnur fáa tá fatan, at skjótingin ikki er ov høgt prioritera. Kristiligi Fólkaflokkurin heldur, at hóskiligt er, at vit skjóta millum 10 og 15 hvalir árliga.

**773 hval eftir einum ári**

Yvirlit yvir stórhvalaveiðu frá 1894 vísir, at tað eina árið, tá mest varð skotið, vóru veiddir 773 stórhvalir. Tað var í 1909. Bæði árini fyri vóru næstan eins nógvir stórhvalir skotnir. Annars hevur verið eitt sindur misjavnt.

Bardagaárini var eingin veiða, men í 1945 komu 39 hvalir á støðina við Áir. Árið eftir 100 hval, og í 1947 135. Í 1949 var aftur eitt gott ár. Tá vóru skotnir 307 stórhvalir við Føroyar. Seinasta árið, rættulig stórhvalaveiða var við Føroyar, var í 1968.

tór.-



*Tað var tann tíð, tá tað stóð ikki á at veiða stórhval við Føroyar*

*Stórhvalur í eygsjón*



*Tá løgmaður skal tingast við Douglas Hurd:*

# Vilja ikki lova løgmanni einsamøllum avstað

*– Kanska hevur Douglas Hurd eina skræddaraseymaða loysn við sær í lummanum, heldur Finnbogi Ísakson*

Vóru fjølmiðlarnir ikki so dúgligir at fylgja við, og kanska viðhvørt gita eitt lítið sindur eisini, var ikki vist, at tingmenn høvdu minsta illgrunan til, at løgmaður skal hittan bretska uttanríkisráðharran, Douglas Hurd fyrst í komandi mánað.

Tað skal hann, og júst tað hevur eisini fingið Finnboga Ísakson at leggja uppskot á ting hesum viðvíkjandi.

Finnbogi Ísakson mælir løgtinginum til at samtykkja, at løgmaður sum treyt fyri samráðingum ella samrøðum við bretska uttanríkisráðharran um undirgrundarmarkið millum Føroyar og Bretland setur, at umboð fyri føroysku/donsku samráðingarnevndini um undirgrundarmarkið verða við á fundinum.

Finnbogi Ísakson segði tá málið var fyri á tinginum týsdagin, at tað er ikki óhugsandi, at Douglas Hurd hevur eitt skræddaraseymað uppskot við sær í lummanum, og tá ræður um ikki at leypa framav.

Finnbogi Ísakson segði, at tað var alt umráðandi, at møta væl fyrireikaður til ein tílíkan fund. Hann legði eisini dent á, at tað átti ikki at koma upp á tal, at avgera trætuna við Haag dómstólin.

Hetta seinasta kundi eisini Helena Dam á Neystabø taka undir við, tí hon helt, at spurningurin um lívsgrundarlagið hjá eini heilari tjóð kann ikki avgerast í einum rætti.

Helena Dam á Neystabø, sum er formaður í Marknaðarnevndini upplýsti, at løgmaður hevur verið í nevndini og greitt frá komandi fundinum við Hurd. Hon segði, at løgmaður fer ikki einsamallur av landinum. Við fara tveir embætismenn.

Fleiri høvdu orðið í hesum máli. Millum onnur Jóannes Eidesgaard, varaløgmaður, sum eisini legði stóran dent á at vera væl fyrireikaður til fundin og hava allan neyðugan serkunnleika við.

tór.-




*Fríggjadagin bar Sosialurin tíðindini um, at Edmund Joensen, løgmaður skuldi hitta Douglas Hurd, uttanríkisráðharra Bretlands*

**Barna- og ungdómstelefonin**

hjá Barnabata Reyða Krossi svarar mánadag frá kl. 16–18. Tlf. 10645